


Sosialurin
-tað loysir seg

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá ið okkara elskaða kona, mamma, vermamma,
omma og langomma okkara

**Olga Andreasen**
fødd Bech, úr Dali, búsitandi í Hirtshals

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tey á Malta,
takk fyri troystarrík orð, takk fyri sangir og talur,
takk til tykkum øll, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Archibald og børnini**

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæra
mamma, vermamma, omma og langomma

**Elsebeth Maria Sivertsen**
ættað úr Mikladali

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 14. mai,
79 ára gomul.

Kistan fer úr Ebenezer fríggjadagin kl. 15.30.
Jarðarferðin verður úr Betesda í Klaksvík
leygardagin kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans, Elsa, Jórun, Palli og Fríðgerð**

Tey, ið vilja minnast Elsebeth Mariu, kunnu lata eina peningagávu til barnalegurnar í Grønlandi, konto í Føroya Banka.

# Jóhan abbi farin



15. mars 2002, standi við horninum í hondini, »abbi er farin« sigur kenslurørda røddin í mammu. Abbi er farin, í gjár hevði hann føðingardag, hann gjørdist 87, 87 ár og ein dag gamal. Góði abbi-.

Hevði ynskt at eg kundi sagt tykkum søguna um abba við beinraknum orðum, greidliga víst inn á ta kjanu ið ger abba elskaðan og saknaðan. Men menniskjalívið er fløkjasligt og letur seg ikki lýsa í stuttum.

Ein smádrongur fer andbráur titandi eftir bakkanum. »Hygg nú fara sluppirnar um nesi. Har úti skal eg royna meg sum mann«. Heimbygdin var Kunoy, har abbi vaks upp sum næstyngstur av sjey systkjum, og 14 ára gamal fór hann fyrsta túrin.

»Tá vit sigldu konvoy og vit vóru aftastir, var altíð onkur at taka upp«, »Taka upp«,? »Ja, teir søktu skipini, kavbátarnir«. Abbi sigur frá túrinum í Ameriku. Í 1941 fóru teir við Mjóvanes til New York við vørum, men sluppu ikki heimaftur til Føroya fyrr enn 15 mánaðar seinni. Teir sigldu tískil millum USA, Kanada og Vesturindisku oyggjarnar við sukri og koli hesa tíðina. Eg royni at ímynda mær hvussu teir krøkja í, og royna at fáa kropparnar innum í ótolandi hita, fremmandum umhvørvi og so hetta kríggi, ið ongan enda tykir at fáa.

Í februar 1945 skrivaðu teir tríggir Churchill, Stalin og Roosevelt undir Jaltaavtaluna, sama dagin giftust omma og abbi í kirkjuni í Kunoy, eitt nýtt tíðarskeið í søguni byrjaði.

»Níggju børn abbi, var tað ikki tungt hjá tykkum«? »Nei, tey vóru øll góð børn«. Eg hyggi tortrúgvin uppá hann, men hann tekur bara uppaftur »øll góð børn«. At nakað skal hava verið strævið fái eg ikki lokka burtur úr honum.

»Men tað ferðina úti í Fugloy, tá stóð illa til«, eg veit beinanvegin at abbi er aftri í 1970. Hann sigldi við postbátinum og var sjálvur annar í lítlabáti sum hvølvdist í ringum veðri úti fyri Kirkju »hann fekk meg«. Abbi letur ikki hendingina í fleiri orð, men eg veit at hann var rekkjulagstur langa tíð aftaná og at hin maðurin, Sáma Johannesen, kom ikki aftur í aftur.

Men abbi dvølir ikki við tað gamla, hann fylgir væl við í øllum, sum hendir rundan um hann, hann blandar seg uppí, tá vit tosa um nýggja suðuroyarskipið og fær nærum sannført okkum um, at ein undirsjóvartunnil hevði verið tað allarbesta hjá suðuroyingum at fingið. Síðsta skipið sum abbi sigldi við, var Smyril.

Tá vit stóðu rundan um opnu kistuna segði ein abbasonur, at hetta, at ein dagur var lagdur aftrat teimum 87 árunum, var ein áminning frá tí gamla um at lívið er givið okkum í smáum verðum, ein dag í senn. Ein sonur legði aftrat úti í gongini aftaná, at ígjøgnum arbeiði sítt umborð á Strandfaraskipum Landsins hevði abbi latið nógvar hurðar upp fyri okkum, eftirkomarum hansara. Fólk vistu hvør ið Syderbø var, ein álítandi maður við ljósum sinni.

Liv her og nú! Lat hurðarnar upp! Myndirnar eru djarvar og greiðar, tær reka upp saknin og festa hann í vøkur minni. Tær eggja okkum at hyggja frameftir móti nýggjum frælsum møguleikum.

Gudstrúgvin var ein stillførur undirstreymur gjøgnum eitt langt lív, hon var ein slitin bók, eitt vælsignilsi á vegnum heim, tvær samanlagdar arbeiðshendur.

»Tá vit standa einum menniskja nær, hyggja vit inn í andlitið, sum stóðu vit við bryggjukantin og sóu okkum sjálvi í sjónum har niðri. Men aldurnar strúka burtur myndina einaferð og vit reisa okkum og fara longur burtur frá. Tá bráddliga síggja vit havið liggja har í allari sínar djúpd og heild…« Ein sonur stendur á kirkjugáttini og roynir at greiða mær frá, hvussu saknurin er vaksin hesar seinastu dagarnar – um tað hann hevur mist, havið – upphavið.

Áðrenn vit stillisliga lata bókina um abba aftur á hesum sinni, verður enn ein kapittul lisin fyri fullsettari kirkju.

Hugbrotini eru skrivað síðst í farna ári og dagarnar eftir at abbi er farin.

Leygardagur 22. des. Vit eru komin norður at halda jól.

Standi í hurðini og hyggi inn á sjúkrastovuna, omma situr við songarstokkin og heldur í hondina á abba. Ein sonur er eisini har inni, hann roynir at fáa abba ein vatnsopa at drekka, hondin strýkur um silvurgráa harið og hann bukkar seg niður tá abbi vil siga honum okkurt, leggur so dýnuna betur, roynir umaftur við vatninum.

Slíkur kærleiki er sjáldsamur hugsi eg, eymur kærleiki millum faðir og son, men dagarnar eftir hetta, síggi eg, at rundan um abba er slíkur kærleiki í ríkum máti.

Hvat ger eitt menniskja eyðkent, hvat er tað ið ger at vit sakna? Heima í stovuni sleppur abbi stavinum og rættir armarnar framm ímóti mær, lítla yvirskeggi prikar tá hann kyssir meg á kjálkan »vælkomin góða« – altíð vælkomin. Nú, her eg standi í hurðini, vendir hann andlitið móti mær og smílist, smáar foyrur eru út frá eygunum, tey smílast og glógva.

Jólamorgun 25. des. Abbi svevur, tungi andadrátturin hálar lívið spakuliga inn og út, viðhvørt steðgar hann á, bíðar, og eg steðgi við honum løtan tykist long. »O Jesus pápi« suffar hann tá ið lívið óvart heldur áframm, helt seg nú sleppa higani, men settist aftur at fíla tvørtur um vaðbeini, upp og niður, sárhentur, kroppurin eymur, hann lítur út móti havsbrúnni, enn er einki land í eygsjón. O Jesus pápi, slættur sjógvur og einki lot, vit bæði á deyðsiglara langt úr landi. Hann peikar yvir á svørtu bókina, »les fyri mær«!

Gamlaárskvøld 31. des. Abbi situr uppi í seingini, hann fær sær kaku og heitan drekkamunn. Tá tær komu inn at seta hann upp í áðni, fekk hann tær at flenna, visti hvussu tær itu og hvørjum fólki tær vóru av. Tær fara útaftur í góðum hýri.

»Lívið er ofta baldrut« svarar abbi mær, tá eg spyrji hvat hann hugsar um, nú tá enn eitt ár er við at fara aftur um bak, »tað, sum ræður um, er at halda kósina«, »og ert tú nøgdur abbi«? Hann nikkar, hugsar eina løtu og sigur so »eg eri meira enn tað, eg eri signaður«.

Tá vit vóru smá, settu vit okkum upp á knøini at veittra út gjøgnum bakrútin til abba og ommu ið stóðu í stovuvindeyganum, ongan kendu vit, sum veittraði so leingi sum tey, heilt til vit vóru farin um hornið niðri hjá Fjallheim.

Síggja tit! Nú stendur abbi og veittrar til okkara, hvítu segldúkarnir spenna seg út í fríska vindinum, Syderbø er á ferð móti fjarskotnum strondum. Vit hyggja og hyggja, inntil farið einans er ein svartur blettur í havsbrúnni.

Góða ferð abbi.

Hvat er tað, sum ger eitt menniskja eyðkent, hvat er tað, sum fær okkum at minnast? Hygg í andlitið á bróður tínum, systir tíni, børnum tínum, smáar foyrur eru út frá eygunum, tey smílast og glógva, spegilsmyndin sigur tær at eisini tú ert signaður.

Soleiðis æra vit minnið um abba mín, Jóhan Syderbø.

**Marjun**



# Astrup er ein virðiligur kappingarneyti

FØÐINGARDAGUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*


*Stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup fyllir 60 í dag og í tí sambandið verður móttøka í Føroya Banka.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Hann er eldri enn vit og hann er dugnaligur og hann hevur útslit at vísa á. Hann er ein fyrimynd fyri meg, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoyar Sparikassa í samband við at Jørgen Astrup stjóri í Føroya Banka fyllir 60 ár í dag. Sosialurin hevur tosað við stjórarnar í hinum peningastovnunum í samband við føðingardagin.

Ein, sum hevur nógv samband við Jørn Astrup er annar av stjórunum í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen.

– Astrup er fakliga dugnaligur og eg haldi, at vit hava eitt gott samstarv. Vit eru saman í nevnd í Elektron og Als. Astrup hevur skarpar replikkir og torir at siga sína meining. Hann er ein verdigur mótpartur og kappingarneyti, sigur Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa og hann ætlar sær á móttøku í Føroya Banka seinnapartin í dag í samband við føðingardagin.

Í Vági situr stjórin fyri Suðuroyar Sparikassa, Mikkjal Sørensen og hóast hann ikki í tí dagliga hevur nógv samskifti við Astrup, so hava teir fleiri felagsáhugamál og Suðuroyar Sparikassi hevur sent honum eina heilsan á føðingardegnum.

– Astrup kom í svárastu krepputíð og hann hevur klára gott uppgávuna at fáa bankan aftur á føtur. Eg kenni hann eisini sum ein persón, ið hevur avgjørdar meiningar, sigur Mikkjal Sørensen, stjóri í Suðuroyar Sparikassa.

### Ellisforsetin

– Jørn Astrup hevur sera drúgvar royndir innan bankaheimin og hann er eisini millum 15-25 ár eldri enn hinir stjórarnir í peningastovnunum í Føroyum. Tað er respekt um Astrup og vit royna at liva upp til tað hann er. Astrup hevur nakað at hava sínar meiningar í og tí torir hann mangan at siga tingini bart út, onkuntíð er hann so bersøgin, at eg sjálvur hevði ikki tora at sagt somu orð, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Eg havi stóra virðing fyri Astrup. Hann hevur megnað at vent gongdini í bankanum og bankin er sera vælrikin í dag. Tú veit hvar tú hevur Astrup, og mínar royndir eru, at hjá honum er galdandi gamla orðatakið: – Ein maður er ein maður og eitt orð er eitt orð, – sigur Eyðfinn Reyðberg.


*Mikkjal Sørensen, stjóri í Suðuroya Sparikassa*


*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*


*Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa*

